avreiddu, og vit skóru flak. Hetta mann vera ein tann fyrsta royndin at skera flak í Føroyum. Jens Pauli var fittur at arbeiða hjá.

## Til Íslands

Hetta var í teirri tíðini, tá ið nógvir føroyingar fóru til Íslands at fiska og eisini at arbeiða á landi. Føroyski fiskiflotin var í ringum standi og samstundis manglaðu íslendsku skipini fólk. Tað vóru upp til 1500 føroyingar sum hesi árini fóru til Íslands, og teir fingu eisini væl burturúr.

Tískil fór eg við einum íslendskum trolara í 1959. Hann kallaðist Brimnes. Vit fingu nógvan fisk. Ein túr fingu vit so nógv, at hann gekk ikki í lastina. Vit høvdu stakkar av fiski á dekkinum. Eisini vóru vit í uppisetur við salt, so fiskurin var ikki saltaður. Tá hendi tað, at íslendska krónan í einum fór frá 42 oyru í 27 oyru. Úrtøkan minkaði tilsvarandi.

Tá fóru nógvir føroyingar av. Vit fóru heim við gamla vaktarskipinum Ternuni, sum var komin ørindi til Íslands.

Eg vil nevna nakrar av føroyingunum umborð, sum vóru úrmælismenn: Jóhannes Jacobsen úr Hvalvík, sum arbeiddi á skipafelagnum í nógv ár. Hann var avhøvdari. Aðrir vóru Johan Johansen av Argjum, Árni Dam (Faroe Agency), og ein í Sundunum. Teir vóru úrmælingar. Árni flakti so skjótt. Hann tók ryggin úr, og tað kundu vera fleiri ryggir í luftini í senn. Sjálvur var eg í lastini.

Meðan eg var heima, arbeiddi eg hjá Hans Hilmar Dam, sum hevði rættuliga nógv virksemi og hevði nokk so nógvar mans í arbeiði.

Dánjal Pauli í Búðini hevði saman við Hans Hilmar ein kápul at leggja frá telegrafstøðini og vestur til Velbastaðar. Har arbeiddi eg eisini. Hann liggur vist enn í dag. Hann varð eisini lagdur sera forsvarliga. Vagn Erik Michelsen og Poul Sørensen vóru sýnsmenn.

## Máttu gera kaffi úr sjógvi

Í 1960 fór eg aftur til Íslands, og tá var eg hjá Bæjarútgerðini í Reykjavík. Har var eg við trolaranum Skúla Magnussyni. Íslendingar vóru fittir menn at vera saman við.

Vit komu einaferð úr Vesturgrønlandi. Tann túrin skuldu vit heim fyri summarið. Eg skuldi heim við Drotningini, og tað var um reppið, um vit fóru at klára tað. Tá vit komu á Kappan fingu vit ein ordiligan storm. Tað var vindur, sum eg ikki havi upplivað. Sjógvurin var tó ikki ringur. Men tað var kolandi ódn. Boð vórðu givin um, at eingin skuldi ganga ímillum forskipið og afturskipið. Lastin var full av fiski. Skipið gekk við fullari ferð, men tað kom ongan veg av nógva mótvindinum. Hetta vardi í eitt knapt samdøgur. Tá vit komu burtur úr hesi ódnini og fóru at sigla móti Reykjavík, vísti tað seg, at sjógvur hevði trongt seg inn í vatntangarnar. Teir vórðu hálvfullir í sjógvi. Vatngerarin var gingin fyri, so hetta var ein ring støða. Her varð gjørt te og kaffi í sjógvi. Hvør maður gekk við tunguni úti, tí teir vóru so turrir í hálsinum. So glaðir, sum vit vóru at fáa vatn, tá vit komu til Reykjavíkar, haldi eg ikki, at nakar hevur verið. Tá ið vit løgdu at, leyp øll mannningin á land niðan til ein krana at fáa sær gott kalt vatn uppí munnin.

Vit møttu Drotningini á Reykjanes á veg til Føroyar, so har sluppu vit ikki við. Vit arbeiddu tískil í 14 dagar á landi og sluppu við næsta farti.

Í 1961 fór eg til lands í Íslandi, og arbeiddi í Njarðvík. Tað vóru eisini nógv føroysk konufólk, sum arbeiddu har. Kona mín var ein. Mær dámdi væl, og tað vóru góðar umstøður, og inntøkan var hampilig í mun til tað, sum var heima.

## Við Nornagesti

Tá ið eg kom heim úr Íslandi í 1961 fór eg við Norðstjørnuni hjá Thorvald Andreassen. Vit báðir høvdu verið saman og vóru so væl. Eg var á sildaveiðu við gørnum við honum hetta summarið. Hann lat tá byggja ein línubát í Fraklandi, og 2. januar 1962 fóru vit við Nornagesti. At sleppa við einum línubáti tá var bert fyri teir útvaldu. Eg byrjaði at brúka brillur, tá eg var 40 ár. At brúka brillur á dekkinum, tað er ikki gott. Ofta er nógv sjórok. Tískil gjørdist eg lastamaður.

Tá ið vit komu aftur jólamánaðan í 1962 fór eg í land, tí eg vildi gjarna vera heima um jólini.

Líka fyri jól kom Ivan Carlsen og spurdi, um eg vildi koma at hjálpa sær í svimjihylinum, har hann var stjóri. Eg ivaðist eitt sindur í tí, men eg tók av.

Hóast eg legðist uppá land hevur mær framvegis dámað væl á floti. Og havi eg tískil havt bát.

Eg var fyrsti maður, sum í 1948 bygdi neyst í Álakersvík. Fólk hildu hetta vera svakligt, tí tað var brimpláss. Eisini Frits hjá Gøtu-Anton bygdi neyst tá, men tað hevur ikki bilað.

Abbi segði, at har kom ikki neyst at standa. Hann anbefallaði at seta tveir sverar kongar at festa bátin í. Teir eru bert onkuntíð brúktir.

Hvat síðani hendi, hava vit longu greitt frá í grein í oktober 2007. Johan kom at arbeiða í svimjihylinum restina av sínum arbeiðslívi. Johan greiddi tá frá, at hann, síðan hann var 80 ár, hevði svomið ein tein, sum svarar til leiðina til Íslands, ella 556 km. Tá var hann á veg heim aftur. Ferðin er sett eitt sindur niður vegna eitt strik, hann hevði í vár. Men kortini hevur hann svomið 67 km, síðan oktober, so hann er komin væl til havs!.



Johan og Hellan hava verið á floti og hava fingið hesar kalvarnar

## Kona og børn

Eg giftist 23. desember 1945 við Helenu Nielsen, ættað úr Kvívík. Hon var systir Marin, konu Hans Martin Andreassen, sum var umrøddur í Miðvikuni í samband við Stella Argus í 1957, tá ið hann misti fýra synir. Marin doyði í 1945 frá 11 børnum umframt tað, at hann var sjúkur sjálvur. Tá fór Helena norður til Kvívíkar at vera um tey eina tíð.

Men eydnan var ikki við okkum. Vit fingu ein son í 1946. Eg var burtur við Hjalmar, og tá vit komu inn í Aberdeen lá telegramm frá konuni, sum segði: "Barnið er deytt, men eg livi hampiliga". Tá hevði telegrammið ligið í 8-10 dagar. Hetta var hart hjá okkum báðum. Helena doyði 8. desember 1947.

Eg var so einkjumaður í 4 ár. Tá giftist eg við Emmy Hansen av Toftum.

Vit fingu fyrst ein son, Allan, men hann gjørdist bert tvey ár.

Vit eiga tríggjar synir:

Elstur er Allan, føddur í 1953. Kona hansara er Johanna Danielsen av Fløtum á Strondum. Tey eiga tvey børn.

Næstur er Hellan, føddur 1957. Hann er giftur við Gerdu Magnussen úr Havn. Tey eiga eisini tvey børn og búgva í Noregi.

Yngstur er Sigmund, føddur 1963. Hann er giftur við Katrin Holm úr Hvalba. Tey eiga tveir dreingir. Sigmund og Allan búgva í Havn.

## Framúr søga

Nú eru vit komin til endan á hesi røð. Tað er sjálvsagt ymiskt annað, sum kundi verið lagt afturat. Men nú verður givist í hesum umfarinum. Sum lesarin skilir, so dugir Johan sera væl at greiða frá, og hann minnist eisini so sera væl til. Tí er hansara frásøgn eitt virðismikið íkast til søguna um 20. øld. Ein kann siga, at hetta er søgan hjá einum "proletari", sum hevur upplivað meira enn tey flestu.

Fyri meg sjálvan hevur arbeiðið við hesi frásøgn verið ein fragd. Komið er ofta niðan á gólvið við Gráastein. Hvørja ferð er drekka komið á borðið. Tí skal Emmely eisini hava tøkk. Sonurin Allan hevur eisini medvirkað og skal eisini hava tøkk.



Johan saman við sínum. F.v. Hellan, Johan, Emmy, Sigmundur og Allan